# Hitti valevnini hjá Javnaðarflokkinum

Í sambandi við kommunuvalið 9. november luttaka valevnini hjá Javnaðarflokkinum í fleiri tiltøkum. Her er eitt yvirlit yvir hvørjum tiltøkum valevnini luttaka í og nær tiltøkini verða hildin:

**Hósdagur 4. november valfundur í Læraraskúlanum, kl. 19-21**
Almennur valfundur í Læraraskúlanum undir heitinum »Felags avgerðir - felags ábyrgd«. Fyri Javnaðarflokkin luttaka: **Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjørg Joensen, Halla Samuelsen, Meta Palle og Gunnvør Joensen.** Valevnini hjá Javnaðarflokkinum fara m.a. at tosa um tónleik, íbúðir, syskinaavsláttur, heilsu og kvinnir.

**Fríggjadagur 5. november valevnini hjá Javnaðarflokkinum eru á Jinx frá kl. 17**
Fríggjadagin er J-(avnaðar)-dagur á Jinx. Havnar Messing Kvintett spælir. Valevnini: **Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjørg Joensen, Halla Samuelsen, Anna Maria Persson, Poula Apol, Gunnvør Joensen, Tórfinn Smith, Robert Vilhelmsen, Jan Poulsen, Jói Winther og Hans Jákup Simonsen** verða at hitta. Øll eru vælkomin!

**Leygardagur 6. november valevnini hjá Javnaðarflokkinum eru at hitta í býnum frá kl. 10**
Valevnini hjá Javnaðarflokkinum eru at hitta í býnum. Kl. 10 á Kheops (fyrrv. Konditaríið), kl. 12 í SMS, kl. 14 í miðbýnum.

**Valevnini á netinum**
Á heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum kanst tú lesa meira um valevnini og lesa greinarnar hjá teimum - far inn á www.javnadarflokkurin.fo.

**Koyring á valstaðið**
Ynskir tú at verða koyrd/-ur á valstaðið, so kanst tú ringja á telefon 26 25 69.

# Pedagogur ella hjálparfólk

Hevur tú hug at arbeiða á lítlum dagstovni í hugnaligari bygd, so er hetta møguliga nakað fyri teg. Dagstovnurin í Kvívík søkir pedagog, 40 tímar um vikuna, at byrja 1. desember 2004, ella eftir nærri avtalu.

Løn og setanarviðurskifti eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðarafelag Føroya.

Dagstovnurin í Kvívík er samansettur stovnur og heldur til í tveimum ymiskkum húsum í bygdini. Ein vøggustovubólkur við 10 børnum og ein barnagarðsbólkur við 20 børnum eru í tí eina húsinum, meðan ein bólkur við 6 av teimum elstu barnagarðsbørnunum og 6 børnum í skúlaaldri er í einum øðrum húsum í bygdini.

Tað er barnagarðsbólkurin, sum hevur brúk fyri einum pedagogi, tí verandi pedagogur hevur valt at søkja nýggjar avbjóðingar. Vit kunnu bjóða hugnaligar arbeiðsumstøður, fitt og krevjandi børn og góðar starvsfelagar. Innandura hava vit ikki nógv pláss, men vit hava góðar møguleikar fyri at brúka náttúruna í nærumhvørvinum.

Okkara mál við arbeiðinum er at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin innan fyri teir karmar, sum kommunan setur fyri virksemi okkara.

Vit ynskja umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag. Meira kann fáast at vita um starvið og viðurskiftini við at tosa við Bjarna Clementsen, leiðara á telefon 214360.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan 20. november 2004. Um starvið ikki verður sett við pedagogi, so verður starvið sett tíðaravmarkað við fólki við øðrum førleika. Pedagoglesandi, sum vænta at verða liðugt útbúgving í februar 2005, eru eisini vælkomin at søkja.

**Dagstovnurin í Kvívík**
Att. leiðarin
FO 340 Kvívík
Tlf. 421660

# Erogterapeutur/ Fysioterapeutur
til
## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgerandi Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta beinanvegin.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 13 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- málsviðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til borgarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skriftliga
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- tvørfakligt samarbeiði
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til
**Hjálpartólamiðstøðina,**
**Postboks 1049,**
**110 Tórshavn**

**Umsóknarfreist:** týsdagin 23. november 2004

Lesið Sosialin - so eru tit við



# Lær at úttala teg beinrakid í midlunum!

>> Skeid: "Sjónvarpid kemur um ein tíma! v/TV2 Midt Vest!"

**Fært tú** ilt í búkin, hjartabankan, fer adrenalinið at pumpa, tá sjónvarpið ringir og biður um eina viðmerking? Sigur tú altíð nei – tú hevur "ikki stundir"? Er sannleikin tann, at tú følir teg ótryggan, følir at tú dugir ikki at málbera teg greitt og beinrakið, samstundis sum tú ert bangin fyri, hvussu upptøkurnar verða nýttar? Tú torir stutt sagt ikki at taka kjansin!

Ella hevur tú drúgvar royndir í at luttaka í kjaki, bæði í sjónvarpi, útvarpi og øðrum miðlum? Tú manglar bert at fáa tað síðsta uppá pláss og eitt gott amboð at fáa boðskap tín fram?

***You're on!*** **– eitt handverk, tey flestu kunnu læra!**
Á skeiðnum lærir tú at síggja sjónvarp og aðrar miðlar, sum ein møguleika í staðin fyri eina hóttan! Tú fært innlit í, hvussu miðlafólk arbeiða, hvørjar framferðarhættir tey brúka, og tú lærir at føra tín boðskap fram stutt og greitt, til gagns fyri bæði teg og móttakaran.

Skeiðið vendir sær til øll, sum av og á eru at síggja á sjónvarpsskíggjanum og øðrum miðlum, og sum vilja gera tað so gott sum gjørligt.

**MAX. 8 luttakarar á hvørjum skeiði**

Vit hava 2 skeið:
· Fríggjadagin 19. november *(1 pláss eftir)*
· Leygardagin 20. november *(fá pláss eftir)*

**Tilmelding og meira um skeiðið á www.synergi.fo**
Tel 22 KIMA (22 54 62) · 22 RING (22 74 64)
Fax 322 355 · www.synergi.fo · synergi@synergi.fo
Synergi

# Søkt verður eftir fólki

at arbeiða í vikuskiftum. Ring og hoyr nærri á tlf. 507929 ella 322006 (spyr eftir Heidi)

**Kvikkeyp,**
Hornabø, Tórshavn



# GER KVETTI
**Opel Astra 1600 bíliga til sølu**



**Árg 97 · km. 85.000**

**Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.**

**Til sølu vegna flyting**

**Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com**

EINANS 295,- FYRI HVØNN



JÓLABORÐHALD Á PLATFORM

27. november
4. og 11. desember

Einans 295,- fyri hvønn

Mandlugávan er eitt gávukort á 1000 kr.

Bileggið pláss á heimasíðuni www.platform.fo ella við at ringja á telefon 31 63 63

PLATFORM

# Høll til sølu

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2002 um alment útboð av kommunalari fastogn, lýsir Sumbiar Kommuna høllina, sum stendur á havnalagnum í Lopra, til sølu.

Høllin er 1275 fermetrar stór.

Upplýsingar um søluna fáast við at venda sær til Sumbiar Kommunu.

Møgulig tilboð um keyp skulu vera skrivlig, og verða Sumbiar Kommunu í hendi í seinasta lagi 15. november 2004.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja ímillum innkomnu tilboðini ella at havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344 + 298 211301
Fax +298 370114

félagið
# Tórshøll
í vikuskiftinum spæla:
# FLÚRAR
**SJAVSKAPPING**
VERÐUR MÁNADAGIN 8. NOVEMBER
*kl. 19.00*




TÓGVHANDILIN
# BÚNIN
TIL SØLU
VIÐ INNBÚGV



Sp/f Grannskoðan · Klaksvíksvegur 28
700 Klaksvík · Boks 139 · Tel. 478 000

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Eysturoyingar
## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar hóskvøldið 4. november kl.19.00 á Glyvrum**

**Tilmelding hjá:**
Hugo Kristiansen, tel 225225

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!